LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

BMW 325 TDS STATIONCAR
Árg. 7/95, 147.000 km. Svartur og hevur 17" sportsfelgur. Í sera góðum standi. Annar diesel bilur kann ganga uppí keypið.
Tlf. 222298

VW GOLF C 1,3 TIL SØLU
Reyður, nýsýnaður bíliga til sølu.
Tlf. 211710 - 321710 e.kl. 18

HONDA ACCORD
Árg. 91, hevur koyrt 214.000 km. Væl viðfarin.
Tlf. 447060

OPEL CORSA SPORT
Árg. 95 til sølu. 120 Hk, sportfelgur, senkaður, stórt anlegg, spoylarar allan vegin runt við eisini vetrardekk.
Tlf. 313238

VW GOLF 1,9 TDI
Árg. 93, hevur koyrt 168.000 km. Nýliga skift motor. Hevur sóltak, 15"sportfelgur og nýggj dekk. Bilurin er senkaður, vælhildin og í góðum standi.
Tlf. 214003

DEKK TIL SØLU
Eitt sett av góðum dekkum til sølu. 175/70 R13.
TLF: 373154

TIL SØLU
VW Gearkassi og 4 felgur við dekkum.
Tlf. 210560

FORD ESCORT 1.6
í góðum standi til sølu. Árg. august 1997.
Tel 316814 ella 223366

PASSAT TD1 110 TIL SØLU
Sera vælhildin 3 ára gamal hvitur Passat TD1 110 til sølu, um hóskandi boð fæst. Hevur koyrt 52.000 km.
Tlf. 311418 e. kl. 17

TOYOTA COROLLA
Árg. 87 bíliga til sølu.
Tlf. 315720 - 251457

VOLVO 240 GL
Árg. 88, við skaða. Sýnaður í 2001. Til sølu fyri 6.000 kr.
Tlf. 258749

15" SPORTFELGUR
Passa til Peugeot og Citroen, dekkstødd 15" 205/65, til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 447182 - 227191

EYKALUTIR
til Toyota Carina II, árg. 87.
Tlf. 227191 - 441582

TOYOTA COROLLA DIESEL
Vegna keyp av biligari bili, verður ein Toyota Corolla 2,0 diesel, árg. 96, seldur um hóskandi boð fæst.
Tlf. 227227 e. kl. 14.30

BMW 318 IS TIL SØLU
Árg. 89 til sølu. Bilurin er reyður og hevur nýggjan motor.
Tlf. 321075 - 256442

SLEIPIKRÓKUR OG PÍKADEKK
Sleipikrókur við kontakt til escort (er nýggjur) og 4 píkadekk á felgum til escort til sølu.
Tlf. 217118 ella 317118

CITROEN 1,4
Góðum standi, økonomiskur og sýnaður í januar. Til sølu fyri hægst bjóðandi boð. Anlegg kann fylgja við.
Tlf. 422326

TOYOTA COROLLA 2,0
Diesel. 3 hurðar, sportfelgur, árg. 94. Sær gott út og er í sera góðum standi. Bilurin er til sølu.
Tlf. 457650 - 211409

PIONEER BILSTEREO
Hópin av nýggjastu modellum av bilstereo heimkomin. Landsins bíligastu prísir.
Sørvágs Radiohandil

RESERVADEILIR YNSKJAST
Kúfangari + blinkljós H-framman til Daihatsu Charade árg. 85 ynskist.
Tlf. 448194 - 214125

TIL SØLU
Árg. 89, koyrt 93.000 km. til sølu fyri 15.000 kr. Sýnaður sept. 00
Tlf. 224414

MAZDA 626 GD 1,8
Árg. 88 til sølu. Er í sera góðum standi.
Tlf. 445115

FORD ESCORT 1,6
Árg. 84 til sølu fyri uml. 5.000 kr.
Tlf. 253454

FORD PROBE 2,2 i
Árg. 89, 170 Hk, 17" sportfelgur, azev. dekkstødd 235/40-17, hevur koyrt 150.000 km. til sølu.
Tlf. 210450 - 252819

NISSAN 14 GL SUNNY
Árg. 86, diesel, til sølu.
Tlf. 255551

DEAWOO NEXIA 1,5
Árg. 97, 60.000 km, og nýsýnaður. Bíliga til sølu.
Tlf. 256826 - 447672 - 370362

FORD SIERRA 2.0
Árg. 87, til sølu sum eykalutir.
Tlf. 221026

VØRUVOGNUR
Mazda 2200 e, 4x4, árg. 89, 112.000 km., sýnaður juni 2001. Til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 320265 - 259114 e. kl. 17

OPEL ASCONA 2,0 i
Bilurin hevur 15" alu felgur við góðum dekkum, senkaðu, Remus tuningsútstoyt, pioneer bandavspælara og 200 W sony hátalara. Stýriboksin er farin. Prísur: 7.000 kr.
Tlf. 220744

OPEL KADETT
árg. 87, sýnaður í nov. 2000, til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 316580

TIL SØLU
OZ-Supertourismo felgur v/Michelin dekkum. Stødd: 195/45, 16" passar til Peugeot/Citroen. Nýprísur 11.000, til sølu fyri 7.500 kr.
Tlf. 217747

NISSAN SUNNY
hatchback, 1.6 SLX aut. gear, árg. 87, til sølu fyri 8.000 kr. alt útstoyti er nýtt.
Tlf. 319378 ella 258165

MAZDA 323
Brúnur Mazda 323 árg. 87 til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 455108

VW GOLF 1.8
árg. 1989, sýnaður á vári 2001. Hevur nýggj fekk og sportfelgur, bíliga til sølu.
Tlf. 216760 ella 315153

MAZDA 323 1,5 SEDAN
Árg. 96, hevur koyrt 112.000 km. til sølu. Hevur m. a. alu-felgur og spoylara. So mangla tygum ein góðan og driftsikran bil, ring og fá meiri at vita á
tlf. 226706

CITROEN AX 11 TRE
Árg. 89, koyrt 106.000 km., bíliga til sølu.
Tlf. 448923 - 254321

BILAR TIL SØLU
Volvo 440 TDI Diesel, árg. 6/94. Audi 100 Limosine 2,5 TDI Diesel, árg. 10/93. Sóltak, alufelgur, radio/cas. o. a. Audi 100 2,5 TDI Avant Diesel, árg. 11/92. Sóltak, alufelgur, viðfestikrókur, radio/cas. o. a. Audi 80 1,9 TDI Diesel, árg. 6/94. Sóltak, radio/cas. o. a. Audi 80 1,9 TDI Auotmatic Diesel, árg. 6/94. BMW 525, árg. 3/94. sóltak, radio/cas. o. a. Ford Granada 2,8l, ca. 170HK, árg. 83, gev eitt boð. Myndir síggjast á www.bilar.fo Bíligari bilar vera tiknir í býti. Úrvælisbilar Spf. Bakkavegur , 530 Fuglafjørður. Fax. 444638. Teldupostur: bilar@bilar.fo
Tlf. 444943 - 217704

Amboð

EIN ELDRI KOMPRESSARI
og ein rennugravari MF 50 B til sølu.
Tlf. 441515 - 211514

LUNA AP 1000
trædreygibonkur til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 226315 - 317414

Arbeiði

REINGERÐINGSHJÁLP
ynskist uml. 3 tímar um vikuna.
Tlf. 316741

ARBEIÐI SØKIST
22 ára gamal maður søkir eftir arbeiði. Eg havi teldukunnleika innan ávís økir og lokið fleiri stakgreinalestrarfak í hoydølum.
Tlf. 253468

ARBEIÐI SØKIST
Nærum 18 ára gamal drongur søkir arbeiði, alt hevur áhuga
Tlf. 258406

NAKAÐ ARBEIÐI??
Eg eri ein 21 ára gamal drongur í Havn, ið gjarna vil hava eitt arbeiðið. Eg havi mest royndir innan timburarbeiði. Hevur nakar brúk fyri mær, so ring á
tlf. 227127

ALTJÓÐA FYRITØKA
sóknast eftir fólki í Føroyum. Góð løn til tey røttu fólkini. Vitja heimasíðuna:
www.arbejd.nu/1050.htm
Tlf. 8737646

HEY!
Eg eriein 10 ára gamal drongur, ið fegin vil hava okkurt arbeiði, so sum at ganga túr við heimalanda og grindir o. s. fr.
Tlf. 318544 Árni

HYGG HER!!!
Leitar tú eftir avbjóðing. Arbeiði heima. Frí, tá ið tað passar tær. Hálva ella fulla tíð.
Tlf. 217790

TILBOÐ YNSKIST
til at gera garð.
Tlf. 315528

SØKT VERÐUR
eftir einum timburmanni at leggja tak á eini hús.
Tlf. 422027

Barnaansing

BARNAGENTA!!
Ert tú góð við børn, og hevur áhuga at verða hjá mær mánakvøld og mikukvøld, tá ið mamma er til arbeiðis, so ring á
tlf. 319651 - 219651

DAGRØKTARMAMMA YNSKIST
Til at ansa eftir dóttir okkara, sum er 5 ár, søkist fitt og vinarlig dagrøktarmamma skjótast gjørligt. Vit eru til arbeiðis mána- til frígjadag frá kl. 08.30 til 16.00. Ert tú tann rætt, vinarliga ring á
tlf. 322250

KVINNA
søkist at ansa okkara 3 1/2 ára gomlu gentu 3 dagar um vikuna. Tað er ein fyrimunur, um onnur børn eisini eru.
Tlf. 215452

BARNAGÓÐ KONA/GENTA
søkist at ansa 5 mór. gamla soni okkara frá 1. okt. umleið 20 tímar um vikuna.
Tlf. 313312 - 213352

SØKT VERÐUR
eftir onkrum at ansa 4 mór. gomlum dreingi, 3-4 fyrrapartar um vikuna, meðan eg eri í skúla, byrja beinanvegin.
Tlf. 250899

Barnaútgerð

BRIO COMBIVOGNUR
Vælviðfarin Brio combivognur við lift, posa og puslitasku til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 449202 - 221271

HVÍT TREMMUSONG
60 x 120 cm v/madrassu. 1 1/2 ára gomul, til sølu fyri 450 kr.
Tlf. 457145 e. kl. 18

SIMO KOYRISTÓLUR
við galseju, til sølu fyri 1.500 kr. Stólurin er myrkabláur við reyðum og grønum myntri. Kurv, innkeypsnet og regnskjól fylgja við.
Tlf. 312963

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Myrkabláur ternutur BRIO barnavognur við babylift og tasku, 2 ára gamal, til sølu fyri kr. 2.000,-
Tlf. 422262/223232/422033

BABYALARMUR
ynskist il keyps.
Tlf. 333210 ella 217421

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Ein ljósur barnavognur bíliga til sølu, regnslag og madrassa fylgja við.
Tlf. 333210 ella 217421

Bátaútgerð

SEKSARINGUR
ynskist til keyps, helst við fiskiloyvi.
Tlf. 313586 - 224875

BÁTAMOTORUR 45 HK
Bíliga til sølu. Kann roynast um áhugi er.
Tlf. 287764 - 332764

GEAR YNSKIST TIL KEYPS
Gear til Volvo Penta TAMD 31B, helst typa MSHA 2,63 ynskist til keyps.
Telefon 218082

BÁTUR TIL SØLU
30 fót Aramis bátur, 4 elektroniskar vágasnellur, 136 HK-Volvo motor, radara, ekko-lodd, GPS, plottara og VHF, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 443095

Bingo

FRÁ STRÁLUNI
Gott bingo verður á Strodum sunnudagin 2. sept. kl. 16. Burturlutað verða m.a. 3 føroysk krov í heyst. Eisini verða lúkur at lata upp.
Strálan

GOTT BINGO
verður í TB-húsinum tórsdagin 30. august kl. 19. Høvuðsvinningur 2x500 kr. Hvørt bingo 300 kr. Eykaspæl verður eisini.
Tvøroyrar Bóltfelag

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður leygardagin 1/9 kl. 19. Full pláta 400 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli 1 lamb. Eykaspælið 1.400 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

GOTT BINGO
verður í framtíðini 5. sept. kl. 19.30. Full pláta 300 kr. 6. og 12. spæl 500 kr. Á lutaseðli m.a. lamb í heyst, 1/2 krov og 500 kr. Eykaspæl verður.
KFUM skótarnir í Vági

BINGO
Bingo verður í Felagslonini í Fuglafirði hóskvøldið 30. aug. kl. 19.30.
Eldrafelagið borgin

BÁRUBINGO
Heimabingo fæst til keyps á posthúsunum og sølubúðum kring alt landið. Tú sært beinanvegin, um tú hevur vunni
Bygdarfelagið Báran

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu hósdagin 30. august kl. 19.00. 500 kr. fulla plátu. Á lutaseðlinum m.a. ein vikuskiftisflogferð. Øll eru hjartaliga vælkomin. Eykaspæl verður.
Kyndil

SEYÐABINGO
verður í Skálanum 3. sept. kl. 19.30. Full pláta: Nátungar. Í alt 12. seyðir, veðrur og lomb. í alt verða 60 lutir burturlutaðir. Við teim flestu og bestu vinningunum
Bygdafelagið Báran í Árnafirði

Bøkur

LITTERATURHÅNBOGEN
ynskist til keyps.
Tlf. 313372

BØKUR TIL FHS OG HH
til sølu fyri hálvan prís.
Tlf. 311149 - 311305

BØKUR
Bøkur til sjúkrasystra útbúgvingina til sølu við nógvum avsláttri. Nógvar av bøkrunum eru ongantíð brúktar. Áhugaði kunnu ringa á
tlf. 312884 - 223315

HH-BØKUR
bíliga til sølu.
Tlf. 371360

BØKUR TIL HF
Er tað nakar, sum hevur »Alle tiders Geografi 2000« og »Den nye verden« at selja mær, so ring á
tlf. 255209 e. kl. 16

STUDENTASKÚLABØKUR
Studentaskúlabøkur til danskt, føroyskt, enskt, franskt, alisfrøði, geografi, biologi, kemi, matematik, religión, søgu og samfelagsfrøði eru biligani til sølu.
Tlf. 319912

BØKUR
Bøkur til HF, student og handilsskúla brúktar, einar 60 ymiskar, innan greinarnar føroyskt, danskt, enskt, týskt, spanskt, støddfrøði, lívfrøði, landalæru v.m. seljast bíliga.
Tlf. 310996 ella 222887, best eftir 17

Brævaskifti

PENFRIENDS
We are two women who would like to have penfriends from your beautiful Islands. Name: Miss Rosemond Turckson Sex: 26 years old Address: P. O. Box 217, Oguaa Central Region Ghana, W/Africa. Hobbies: Travelling, Dancing, Cooking and peaceful friendship Name: Miss Mercy Robertson Sex: 27 years old Address: P. O. Box CT 1386, Cape Coast Capital, Ghana. Hobbies: Swimming, Travelling, Attending Church and Exchange of gifts.
Thank you

Burturm. /funnið

DAMUUR FUNNIÐ
Eitt gulldublé damuur við smælari gulldublé reim er funnin á Tógvu. Fast við at heinta tað á Tógvu 12.
Tlf. 312302

SÚKKLA
av slagnum Silverado - Freespirit funnin í Stoffalág áðrenn ólavsøku
Tlf. 311802

FARTELEFON BURTURMIST
Nokia 3310 fartelefon burturmist á ólavsøku. Hylkið er svart við reyðum flammum. Hevur tú funnið hana, so ring vinarliga á
tlf. 310226

SEIKO DAMUUR
funnið í Kommunuskúlagarðinum á ólavsøku. Eigarin kann ringja á
tlf. 312850

COWBOYBUKSIR/SKJÚRTA
Hevur nakar funnið ein beriposa við hvítari skjúrtu og cowboybuksum, stødd 12 ár? Burturmist á ólavsøkukonsertini 27/7. Um so er, ring á
tlf. 371561

BURTURMIST
Blástríputur toypungur burturmistur á strekkinum frá svimjihøllini til Varðagøtu. Í punginum er ein 50 kr. seðil, svimjikort og blýantsstiftir. Um onkur hevur funnið pungin hjá mær vinarliga ring á
tlf. 318682, Elin

JAKKI BURTURMISTUR
Tú, sum av misgávum tók mín 3/4 langa svarta jakka við hettu í Sjónleikarahúsinum á ólavsøku, vinarliga ring
tlf. 317346

CANON-RYGGSEKKUR
Um nakar hevur funnið mín canon ryggsekk við fototóli í, vinarliga ring til mín á tlf. 321232. Finningarløn verður latin.
tlf. 321232

Býli

VERILSI TIL LEIGU
til friðarligt fólk, sum hvørki roykir ella drekkur.
Tlf. 312539

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungur maður søkir íbúð skjótast gjørligt. Skal helst vera ein lítil íbúð.
Tlf. 313272 - 284568

ÍBÚÐ Á ARGJUM TIL LEIGU
Íbúð 3 kømur, ein stova, køkur, bað og kjallari til leigu. Kann eisini leigast sum 3 kømur við felags stovu og bað. 2 mór. depositum.
Bill. mrk. 62-2

ÍBÚÐ ELLA KAMAR YNSKIST
til leigu í Tórshavn ella nærhendis.
Tlf. 258821

ÍBÚÐ TIL LEIGU Á ARGJUM
Uml. 60 m2, 2 kømur, stova/køkur, gongd og baðirúm. 4.500 kr. pr. mór. + el. Til leigu frá 1. sept.
Bill. mrk. 62-1

HÚS TIL LEIGU
Hús í miðbýnum í Havn (60 fermetrar) til leigu ímóti leigu av eini íbúð í Keypmannahavn. Íbúðin skal hava minst 2 verilsir, stovu og køk. Leigumálið skal vara minst eitt ár.
Ring á telefon (+ 45) 27 28 50 04

TIL LEIGU
Lítið kamar við atgongd til stovu, køk, baðirúm og vaskimaskinu til leigu.
Tlf. 313570 - 213571

ÍBÚÐ Í KBH. YNSKIST
Tvær ungar kvinnur søknast eftir íbúð í Keypmannahavn til leigu ella keyps.
Tlf. +45 20913435 - 455379

HÚS/ÍBÚÐ
Einligur pápi við einum barni leitar eftir hús/íbúð, skjótast gjørligt.
Tlf. 423061

ÍBÚÐ YNSKIST Í HAVN
Ung, friðarlig genta leitar eftir íbúð ella kamar við atgongd til køk og wc.
Tlf. 251840

ÍBÚÐ/HÚS YNSKIST
Íbúð/hús ynskist til leigu til par seinast í tjúgunum í Havn. Roykja og drekka ikki. Fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 319780 - 226540 e. kl. 16

VÁGUR
Par við einum barni, 10 ár, ynskir hús til leigu í Vági. Gott hús, góð leiga
Tlf. 374550 - 210262 - 210263

HÚS Í VÁGI
til sølu.
Tlf. 373004

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungt friðarligt par søkir íbúð í Havn. Roykja ikki.
Tlf. 258409 e. kl. 18

ÍBÚÐ YNSKIST
Helst í vesturbýnum. Má hava tvey kømur.
Tlf. 317290

HJÁLP!!
Einlig mamma søkir íbúð/hús í Havn skjótast gjørligt. Eru friðarlig.
Tlf. 253166

HÚS Á GLYVRUM TIL SØLU
Húsini liggja við høvuðsvegin á Glyvrum og eru í tveimum hæddum á 113 m2 hvør og íbúð í kjallaranum. Húsini verða seld, um nóg høgt boð fæst.
Bill. mrk. 60-3

SETHÚS TIL LEIGU
Stór sethús í vesturbýnum í Havn til leigu frá uml. 1. sept. Leiga: 9.000 kr. við hita. Depositum: 25.000 kr.
Bill. mrk. 60-2

ÍBÚÐ YNSKIST
Ung kvinna søkir íbúð í Havn. Eri friðarlig og fari væl um.
Tlf. 332119 - 257657

ÍBÚÐ YNSKIST
til friðarliga familju skjótast tilber. Má verða í Havn,
Tlf. 226629

HÚS Í MIÐVÁGI TIL SØLU
Boð undir 800.000 kr. ongan áhuga.
Tlf. 333028 - 212499

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
ynskist til framleigu frá 1. jan. - 1. feb. 2002 til tvær sjúkrastystralesandi, ið fara í praktik.
Tlf. 224614

ÍBÚÐARNEYÐ!
Ungt par við einum barni, søkir íbúð í Tórshavn ella nærhendis skjótast gjørligt, av tí at íbúðin, ið vit búgva í verður seld 1.sep. Gjalda til tíðina.
Tlf.: 319023

ÍBÚÐ YNSKIST
27 ára gamal maður, friðarligur, ikki roykjari við føstum starvi, ynskir íbúð til leigu í Havn, Argjum ella Hoyvík um skjótast.
Tlf. 224546 e.kl. 17

ÍBÚÐ YNSKIST
til mammu og 2 synir max. prísur 3.700 við ljós og hita.
Tlf. 250899

HÚS/ÍBÚÐ
Vit eru 2 (25 og 32 ár), ið søkja stórt kamar ella íbúð frá 1. okt. ella skjótast gjørligt. Bæði hava fæst arbeiðið. Alt hevur áhugað.
Tlf. 251106

ÍBÚÐ YNSKIST
Trý íslendsk systkin ynskja ein íbúð. Vit hvørki roykja ella drekka.
99Kristinso@nvd.fo
Tlf. 317065 - 315227

Dýr

KETTLINGAR FÁAST
10 vikur gamlir kettlingar fáast. Tveir eru ljóst grástriðutir, ein hann og ein hon. Og ein er brún/svart stríputur við hvítum labbum, er ein hann. Eru reinligir og vanir við hund.
Tlf. 319782 - 255941

HJÁLP!!!
Eg kann tíverri ikki hava hundin (lítið hundaslag) hjá mær meir, vegna nýggjar umstøður. Er tað nakar sum er góður við hundar, helst tilkomin fólk, sum vil geva honum eitt nýtt og gott heim???
Tlf. 455104

HUNDAHVØLPUR
Hundahvølpur ynskist, skal ikki bliva ov stórur.
Tlf. 310404 Kiran

FUGLABÚR
við øllum tilbehoyr til sølu fyri 500 kr. Brúkt í 5 mør.
Tlf. 371926

HUNDAHVØLPUR
Sera fittur hundahvølpur ynskist til keyps. Skal vera av lítlum hundaslagi. Helst ikki collie.
Tlf. 333582

DVØRGAHAMSTRARAR
2 dvørgahamstrarar og búður ynskist til keyps.
Ring tlf. 319206

DUNNUR TIL SØLU
4 mór. gamlar dunnur til sølu fyri 150 kr. stk.
Tlf. 449089

DUNNUR TIL SØLU
4 mór. gamlar dunnur til sølu fyri 150 kr. stk.
Tlf. 449089

SEYÐAHUNDAR
Seyðahundahvølpar fáast við at heinta teir.
tlf.: 375606 ella 253122

KETTA BURTURBLIVIN
6 mánaðar gomul reyðstríput ketta/kettlingur burturblivin í J. Paturssonar gøtu í Havn, fríggjadagin 17.08. Er nakar ið hevur sæð kettuna, vinarliga ring
tlf. 317976

KETTLINGAR
2 kettlingar verða latnir djóravinum.
Tlf. 321291

Fundir

PENSJÓNISTAFELAGIÐ
í Tórshavn kemur saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøldið 29/8 kl. 19
Nevndin

Húsarhaldstól

KØLISKÁP
Zanussi ZF 155 til sølu fyri 2.000 kr. Brúkt í 2 mór.
Tlf. 221250

Innbúgv

BIDÉ VIÐ KRANA
Ongantíð brúkt til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 371926

TIL SØLU
Borð við 6 stólum og ein skenkur, alt í bókatræi, bíliga til sølu.
Tlf. 316814 ella 223366

SOFA/BRIKS
90x200 cm. til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 310009 best e. kl. 16

TIL SØLU
Tvær jubileums madrassur, 90x200 til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 218514

TIL SØLU
Ymiskt innbúgv m. a. hornasofa, 3 manns sofa + 2 stólar, song 140x200, skrivaraborð, brúks o. a. bíliga til sølu.
Tlf. 314919 e. kl. 17

TIL SØLU
Skenkur/vitrine skáp (nýtt) til sølu. Hevur 2 skáp, 2 skuffur á undirpartinum og 2 glashurðar á yvirpartinum. Stødd 180 cm høgt, 104 cm breitt, djúbd y 27 cm og 43 cm undir.
tlf. 316813

BOXMADRASSA
við lútaðum høvda- og fótalag. 120 cm breið.
Tlf. 449732

TIL SØLU
Sera vakrir myrkir spísistovumøblar av merkinum Heppelwhite til sølu. Runt borð við tilhoyrandi glasplátu og 4 stólum. Skenkur 220 cm langur. Kunnu siggjast eftir nærri avtalu.
Tlf. 321309 millum kl. 13-15

HARMONIKUHURÐ TIL SØLU
Hurðin er myrkt brún og 205 x 275 til støddar – kr. 1.500,-
Tlf. 333210 ella 217421

Mat

GRIND TIL SØLU
Salta grind og spik í kaggum til sølu.
tlf. 313383

SALTGRIND
og spik til sølu í 60 l. kaggum.
Tlf. 318364

GOTT SMYRJIBREYÐ
fæst.
Tlf. 258908

Pløgg

KONFIRMANTSKJÓLI
str. 36, Lilly model til sølu fyri 800 kr. Nýprísur 1.400 kr.
Tlf. 318596

GRØNUR SKÓTABÚNI
til drong uml. 8-12 ár ynskist til keyps.
Tlf. 319911 - 259200

KONFIRMATIÓNSKJÓLI
str. 38 ynskist til keyps.
Tlf. 317889

Samband

MAÐUR YNSKIR SAMBAND
Edrúiligur maður líka farin um tey 50, ynskir samband við fitta kvinnu 45 - 50 ár. Hevur hetta tín áhugað, so skrivað til
Bill. mrk. 60-1

Sjavs

SJAVSKAPPING
verður í LÍF-húsinum hóskvøldið kl. 18.30
LÍF

SJAVSKAPPING Á STRONDUM
Leygardagin 1. sept. kl. 16 verður sjavskapping á Strondum. 4 tey bestu pørini fáa steyp til ognar.
Strálan

Súkklur

SCOOTARI TIL SØLU
7 mór. gamal Derby scootari við kassa. Er í góðum standi, til sølu fyri 18.000 kr. Nýprísur 20.500 kr.
Tlf. 254959

DBS GENTUSÚKKLA
Gul og reyð við bláum skermum. tikin uttanfyri SMS 10/8 kl. 22.35. Veit nakar av súkkluni, so ring vinarliga á
tlf. 215524 - 316624

SKUTARI YNSKIST
Eitt ára gamal Honda skutari ynskist til keyps.
Tlf. 319806

FJALLASÚKKLA
21 gear til sølu fyri 1.800 kr.
Tlf. 221250

WINTHER GENTURSÚKKLA
Myrkalilla, 6-7 ár og 1 ára gomull.
Tlf. 449732

APRILLIA CLASSIC 50
til sølu, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 289090 - 258049

MOTORSÚKKLA TIL SØLU
Kawasaki ZXR 400, árg. 95. Er í sera góðum standi.
Tlf. 252653

Teldur

PENTIUM III
Hevur DVD, office pakkað. Prísuppskot 9.500 kr.
Tlf. 251090

TIL SØLU
Ein 20 GB Harddiskur til sølu fyri kr. 600,-
Tlf. 211994

FUJITSU SIEMENS FARTEDA
til sølu. 64 Mb Ram, 500 Mhz, 10 Gb, 56 K-bit modem, 100 M-bit netkort. Nógv onnur útgerð. Einans 9.000 kr.
Tlf. 321350 e. kl. 19

TIL SØLU
375 Mhz, 64 Mb Ram, 1,5 Gb harddisk, 15" skerm, ljóðkort, til sølu fyri 3.500 kr.
Tlf. 211994

TELDA TIL SØLU
AMD 1200 Mhz, 64 Mb Ram, 21" skerm, Motherboard, ljóðkort, 2 hátalarar, mús, knappaborð, netkort og 8 x cd rom. Til sølu fyri 4.000 kr. Kann eisini seljast sum eykalutir.
Tlf. 315723

TELDUSPØL TIL SØLU
Fallout Tactics, Delta forse land warrier og Diablo. 200 kr. stk.
Tlf. 315723

SMART 733
Smart 733 MHZ P III Book PC II (310 X 270 X 80 MM) 10 GB Harddisk, DVD drev 8/40, 56K modem, 10/100 netkort, innbygdir stereohátalarar, tastatur, mús, 733 MHZ PIII CPU, S-VHS útgongd A/V útgongd, 4 USB, gameport, printerport, CD við alt software, driver og manual, til sølu fyri 7.500 kr.
Tlf. 32876213

TOSHIBA FARTELDA
við tasku. 64 Mb Ram. Windows 95 til sølu.
Tlf. 449732

TIL SØLU
Playstation v/2 joystik, 1 memory kort, 1 link cable og 7 orginal spøl. Abe, vigilante 8, driver, need for speed, rally, duke - nuken, tekken 2 og nøkur demo spøl. Til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 447568

GÓÐ TELDA TIL SØLU
700 Mhz Duron, 176 MB RAM, 30 GB Harddisk, 17" Sony Trinitron skerm, TNT m64- grafik-kort, DVD & CDRW. Til sølu fyri 8.000,- ella hægsta boð.
Ring tlf 220600

NINTENDO 64 SPØL
Mariocart 64 – 300 kr., Yoshis story 400 kr., Golden eye 007 200 kr.
Tlf. 314328

LUMMATELDA TIL SØLU
HP Jornada 548 pocket-pc við Windows Ce. samskiftir við vanligu telduna í øllum microsoft programmum. Vælegnað til sølufólk. Prísur 4.000 kr.
Tlf. 216615

FLØGUSPÆLARI VIÐ BRENNARA
Ein næstan nýggjur Philips CDR 775 spælari við brennara og fjarstýring fyri einans 2200 kr. CD-spælarin er til stovuannleggið. Nýprísur umleið 4000 kr.
Tlf. 317376

Tónleikur

YAMAHA PSR 320
Keyboard til sølu fyri 2500 kr. incl. sustain pedal, bonur diskur og umformari. Nýprísur 4900 kr.
tlf. 448018, eftir kl. 18.00

TRUMMUSETT
Brúkt trummusett ynskist til keyps. Alt undir 5.000 kr. hevur áhuga.
Tlf. 221355

KEYBOARD
Yamaha PSR-620 frá 95 til sølu fyri 5.500 kr. Við fylgja umformari, sustain pedal, stativ og taska til keyboardi. Eitt tilsvarandi kostar í dag uml. 11.000 kr.
Tlf. 255078

Út- & Sjónvarp

SJÓNVARP
Samsung 28" sjónvarp til sølu fyri 3.500 kr.
Tlf. 221250

RADIO YNSKIST
Eg vil gjarna keypa eitt Fandberg huldra radio. Um nakar hevur slíkt, so ring endiliga á
tlf. 319613

Ymiskt

HAVNAR KFUK-SKÓTAR
Havnar KFUK-skótar byrja nú aftur: Spírar (forskúlaaldur og 1. flokkur) mikudag kl. 16.30 - 18.00. Títlingar (2.-4. flokkur) Mikudag kl. 16.30. Skótar (5. flokkur og eldri) hóskvøld kl. 19.00. Ungdómsskótar (8. flokkur og eldri) týskvøld kl. 19.30
Øll eru vælkomin

PLAYSTATION 2
við spølum og joystikk til sølu.
Tlf. 314168

DUNNUSPÆL
verður í Sandvík týskvøldið 4/9 kl. 19.30. Full pláta 300 kr. Dupult rekkja 150 kr. ella hálvt krov. Eykaspælið á 3.000 kr. endar. 20 kr. spæl verður eisini.
Bygdafelagið á Rananum

TIL SØLU
Hondmálaðir gløs av merkinum »Dansk blå blomst« frá Christine Holm. Sera vøkur reyðvíns-, hvítvíns-, øl-, vatn-, sherry- gløs. Harafturat, er vínkaraffil og vatnkanna. Kann supplerast upp.
Tlf. 259107

PLAYSTATION
Playstation við 2 joystikkum, 1 memory kort og 6 spøl til sølu fyri 1.800 kr.
Tlf. 311263

TIL SØLU
Einkult solarium 1.500 kr. Renniband 800 kr. Orbitrek 800 kr.
Tlf. 222416

TIL SØLU
2 innhurðar v/ karmi 80 cm 6 vindeygu v/ karmi tophongd 110+120 cm 9 radiatorar v/ termostati dubultir longd 110 - 90 - 80 - 65 - 40 cmvinarliga skrivið og hoyri meira
p-h-s-o-@post.olivant.fo

VINDEYGA YNSKIST
Hædd 80 cm og breidd 120 cm.
Tlf. 448590 - 218590

TUNDRA SAMLISTELL
Ymiskir lutir til dørurðastell til sølu.
Tlf. 448595 e. kl. 18

TIL SØLU
Kassaaparat til sølu. Prísuppskot 2.000 kr.
Tlf. 213145

NÝGGJ LUFTBYRSA
v/magasin, er ikki brúkt, til sølu.
Tlf. 313799 - 221158

PLASTIKVINDEYGU TIL SØLU
Fabriksnýggj plastikvindeygu til sølu 120 x 120.
Tlf. 219494

VINDEYGU TIL SØLU
2 vindeygu 1x1,80 m, til sølu fyri 600 kr. stk.
Tlf. 310009 best e. kl. 16

PARABOL SKIPAN
Humax móttakari + 120 cm parabol til sølu fyri 5.500 kr.
Tlf. 221250

RÁGLASRÚTUR
til úthurð (115 L 51 B) til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 333445

KØLIREOLIR
2 kølireolir bíliga til sølu. Hava leysan kompressara.
Tlf. 315528

TIL SØLU
Hond útskornir fjallstavar til sølu.
Tlf. 332888

TIL SØLU
Sera væl viðfarin Siemens M35 til sølu fyri 1.100 kr.
Tlf. 252700

PROFESSIONELT
fototól ynskist il keyps, t.d. Nikon, Pentax o.a. stødd 24 x 36.
Tlf. 372950 eftir kl. 17

ER TAÐ NAKAR
ið ætlar at flyta ein tóman vøruvogn úr Danmark til Føroya í dagunum 7.-10. september, gjaldi eg fegin fyri flutningin, um eg kann fylla bilin.
Tlf. 314154, Hallur

Lýsingartekstur

_____

_____

_____

_____

_____

_____

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

- ❑ Akfør
- ❑ Barnaansing
- ❑ Bingo
- ❑ Býli
- ❑ Dýr
- ❑ Innbúgv
- ❑